TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

Hoyvík 6. mai 2022
J.nr. 22/01098-4
-/HDM/ASSP

Klaksvíkar Kommuna
Nólsoyar Pálsgøta 32
Postboks 2
710 Klaksvík
klaksvik@klaksvik.fo

**Viðmerkingar til uppskotið til almenna byggisamtykt fyri Svínoy, tykkara J. nr. 21/01716**

Niðanfyri eru viðmerkingar til uppskotið til almenna byggisamtykt fyri Svínoy.

Bygdin Svínoy er fyrndargomul bygd, ið millum annað er nevnd í Føroyingasøgu frá 1200-árunum, í Hundabrævinum frá umleið 1400, og í elstu varðveittu jarðarbókini frá 1584, har fyrndarbýlingarnir heimi á Bø og úti á Bø eru nevndir fyrstu ferð. Eftir at útróðurin av álvara tók seg upp um aldarskiftið 18-1900 vaks bygdin og nýggj lendi vórðu løgd inn til landbúnað og annað virksemi. Hendan langa søgan í Svínoy sæst aftur í mongu fornminnunum í báðum býlingunum og ríka mentanarlandslagnum innan fyri bøgarðarnar, har teigar, lagaðir garðar, gróthús, myllutoftir og aðrar húsatoftir seta sín dám. Úti á Bø er landslagið sjáldsama ríkt við forn- og mentaminnum heilt eystur til bøgarðin, ið nú er. Hetta kann ikki upplivast á sama hátt aðra staðni í Føroyum.

Vit hava sostatt viðmerkingar til uppskotið um nýggja byggisamtykt viðvíkjandi báðum fyrndarbýlingunum, umframt viðmerkingar til onnur økir við forn- og mentaminnum. Byrjað verður við viðmerkingum til úti á Bø, harnæst heimi á Bø og síðan onnur øki. Til síðst er ein samanumtøka.

Hjálagt er kortskjal, ið lýsir viðurskiftini.

## 1: Býlingurin úti á Bø

Sum nevnt eru fornar bústaðarleivdir og húsatoftir í býlinginum úti á Bø. Hesar eru friðað jarðfest fornminni, sambært grein 1 í Løgtingslóg nr. 19 frá 1948 um friðan av fornminnum og bygningum. Í fyrndarbýlinginum krevst tí loyvi frá Tjóðsavninum at byggja ella grava í lendinum.

Eystur úr býlinginum úti á Bø, gongur fyrndargamla geilin, ið sæst millum vegirnar. Sí kortskjalið. Geilin gongur eystur til gamla bøgarðin, ið var, áðrenn gerði og byrgi vórðu løgd afturat bønum seinni í tíðini. Í uppskotinum, ið nú fyriliggur, eru økini A33 og A34 løgd út sum byggiøki og ganga eystur um fyrndarbýlingin úti á Bø og inn yvir eitt nú geilina.

Mælt verður til at mentanarlandslagið í býlinginum úti á Bø og eystur til verandi bøgarð verður varðveitt við øllum teimum fornminnum og mentaminnum, ið har eru. Hetta innan fyri økið, ið er skraverað við reyðum á kortskjalinum. Hetta kundi verið gjørt við serstakari økisáseting í byggisamtyktini, um at grevstrarabeiði ella onnur arbeiði, ið føra við sær broytingar í lendinum, krevja loyvi frá Tjóðsavninum. Mett verður ikki at A33 ásetingin er hóskandi fyri fyrndarbýlingin.

**2: Býlingurin heimi á Bø**

A33, ið er lagt út sum byggiøki í uppskotinum til almenna byggisamtykt fyri Svínoy, fevnir um fyrndarbýlingin heimi í Bø. Í býlinginum eru friðað jarðfest fornminni í lendinum og hesi eru, sambært grein 1 í Løgtingslóg nr. 19 frá 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, friðað jarðfest fornminni, har loyvi krevst frá Tjóðsavninum at byggja ella grava í lendinum.

Ein serstøk økisáseting eigur at vera gjørd fyri allan býlingin. Her kann millum annað vera ásett, at tað ikki er loyvt at byggja ella grava í lendinum, uttan Tjóðsavnið og byggimyndugleikar geva loyvi til tess. Hetta innan fyri økið, ið er skraverað við reyðum á kortskjalinum. Mett verður ikki at A33 ásetingin er hóskandi fyri fyrndarbýlingin.

**3: Onnur øki**

Í økjunum F3, F4, D43 og D44 í uppskotinum til almenna byggisamtykt fyri Svínoy, eru fleiri fornminni. Hetta innan fyri økið, ið er skraverað við reyðum á  kortskjalinum. Mælt verður til at skraveraða økið, verður lagt út sum fríøki við serstakari økisáseting í byggisamtyktini, um at grevstrararbeiði ella onnur arbeiði, ið føra við sær broytingar í lendinum, krevja loyvi frá Tjóðsavninum.

Í samband við serstøk grøn øki, ið eru D42, D43, D44, D45, D46, D47, eigur at verða skoytt uppí byggisamtyktina, at "Ikki er loyvt at byggja siðsøguligar bygningar uppaftur uttan loyvi frá fornminnamyndugleikanum". Tí at sambært grein 1 í Løgtingslóg nr. 19 frá 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, eru hesi friðað jarðfest fornminni. Tí krevst loyvi frá Tjóðsavninum at byggja bygningar uppaftur, byggja ella grava í lendinum ella at gera lendisbroytingar.

**4: Samanumtøka**

Ein áseting eigur at verða gjørd í byggisamtyktini fyri fyrndarbýlingarnar úti á Bø og heima á Bø, ið kundi verið soljóðandi: "Í fyrndarbýlingunum úti á Bø og heima á Bø, er ikki loyvt at byggja ella grava í lendinum uttan við loyvi frá Tjóðsavninum og byggimyndugleikunum".

Í sambandi við grøn øki og tey markeraðu økini á viðhefta kortskjali, eigur eisini ein áseting at gerast. Ásetingin kundi verið soljóðandi: "Tað er ikki loyvt at byggja siðsøguligar bygningar uppaftur, at gera lendisbroytingar, at byggja ella grava í lendinum uttan við loyvi frá Tjóðsavninum og byggimyndugleikunum".

Blíðar heilsur,

Helgi D. Michelsen

Deildarleiðari á Fornfrøðideildini

Hjálagt: Kortskjal dagfest 6. mai 2022.


Geil
Geil
Smiðjutoft
úti á Bø
Fyrndarbýlingur
Á Heygum
Rúnarsteinur
Sornhústoft
Grøv
Kirkjustaðurin
Íshús
heimi á Bø
Fyrndarbýlingur
Húsatoft
Spedalskhústoft
Kyrjarheyggur
Svínoy
Fornminni, varðveitingarverd øki og garðløg
Frámerki
Fornminni
Varðveitingarverd øki
Garðløg
0 50 100 200
Metrar
N
TJÓÐSAVNIÐ
Fornfrøðideildin, HDM, 6. mai 2022
©Umhvørvisstovan